# ítróttur

Nr. 176 • fríggjadagur • 16. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Normjagstran í Klaksvík

**Í dag kl. 10.00 verður 4th Klaksvík International 2005 sett og síðani er fyrsta umfar á skránni. Kappingin endar leygardagin 24. septembur**

ALTJÓÐA TALVKAPPING

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*




*Heini Olsen og Hans Kristian Simonsen eru teir báðir føroyingarnir, sum á pappírinum hava besta møguleikan at standa seg*

Saman við Helga Dam Ziska, ið varð umrøddur í hósdagssosialinum frá seinastu viku, sleppa Heini Olsen og Hans Kristian Simonsen at royna seg í tí eftirhondini siðvondu kappingini hjá Rana Nolsøe. Mogens Nielsen verður sum vant dómari.

Heini, 35, hevur verið rættiliga aktivur seinastu 2-3 árini. Tað hevur eisini givið úrslit. Eftir ein talvligan niðurtúr, sum byrjaði við aldarskiftið og rakk fram til endan av 2003, er Heini nú aftur trygt omanfyri 2300-ratingmarkinum. Millum annað vann hann sær sín fyrsta og einasta IM-norm í januar 2004.

Men 2005 hevur ikki hilnast Heina væl. Tó so, hann vann sær tíggju ratingstig í IM-kapping í Svøriki í vár, men framanundan hevði Heini ikki havt góð úrslit í longri tíð. Helst var hann skuffaður yvir síni fýra stig av ellivu møguligum í Norðurlandameistaraskapinum í Finnlandi í august.

Tí er kappingin í heimbygdini ein upplagdur møguleiki hjá Heina at venda skeivu gongdini. Vit vita hann hevur evnini og neyðugu royndirnar. Ikki er óhugsandi at fimmfaldaði føroyameistarin - sum hevur verið við í øllum trimum undanfarnu Klaksvík Internationals - fer at blanda seg í oddin.

## Nú skal svinga rætta vegin

Ilt er at greiða frá úrslitinum og telvingini hjá 22 ára gamla Hans Kristiani Simonsen í NM herfyri. Feski IM-normurin og kappingarsigurin í 1st Suðuroy International førdi tíverri ikki nakað jaligt við sær í NM. Tvørturímóti. Eitt aftasta pláss og ratingskrædl.

Tað sum eg meini Hans Kristian má gera fyri at betra seg, er at hava tol og brúka neyðuga tíð til hvønn leik. Serliga í miðspælinum hevur Hans Kristian verið ov bráður. Soleiðis varð gongdin í NM. Í fleiri førum var tað Hans Kristian, sum við góðari tíð á klokkuni, leikti avgerandi feilir í góðum støðum.

Nokk við tí neiliga. Hans Kristian er ein fongur fyri føroyska telving. Hann er aktivur og er eisini ein seriøsur telvari, sum brúkar nógva orku og tíð til at betra sína telving. Serliga er hann kønur í byrjanarspæli og at finna rættar ætlanir í ávísum støðutýpum. Og hann fellur ikki í fátt í mótvindi. Næsta kappingin er fyri honum altíð ein nýggj byrjan.

Hans Kristian er, eins og teir flestu, talvliga ov svingandi. Hjá honum merkir tað sum oftast eitt gott úrslit aftan á eitt ringt. Góðar vónir eru tí um eitt gott úrslit hjá kollfirðinginum í Klaksvík, tí Hans Kristian telvar sera sjáldan tvær ringar kappingar á rað. Heini og Hans Kristian skulu hava 7 stig av 10 møguligum fyri at vinna sær ein norm. Helgi Dam Ziska, nýtist "bert" at vinna sær 6,5 stig fyri at røkka einum normi. Hesin munur kemst av, at Helgi hevur væl lægri altjóða ratingtal enn hinir føroyingarnir.

## Gestirnir úr grannalondunum

Útlendsku telvararnir eru úr ávíkavist Svøriki, Norra og Danmark. Allir eru altjóða meistarar (IM).

Johan Eriksson, 31, hevur av ókendari orsøk havt ein steðg frá altjóðari telving í eitt ár. Hann hevur bert telvað seytjan talv á altjóða pallinum seinastu tvey árini, harav níggju í 2th Klaksvík International 2003, sum hann vann. Síðani juli 2002, er sviin einans skrásettur fyri tredivu talv.

Av hesu orsøk er torført at meta um núverandi dygdir Erikssons. Slíkur steðgur kann kosta. Men hvør veit, kanska hann hevur vant í myrkrinum? Johan er ratingfavorittur, men orsakað av drúgva steðginum, verður torført hjá honum at endurtaka sigurin frá 2003. Eirik Gullaksen, 39, hevur telvað støðugt nógv seinastu mongu árini. Ein sterkur norskur altjóða meistari, sum fyrr hevur vitjað í Føroyum, nevnliga tá hann varð nr. 3 í tí serliga landsliðsbólkinum í FM 2003 í Havnini. Gullaksen er eftir míni tykki favorittur at vinna kappingina.

## Vildi til Føroyar aftur

Vinnarin av 3th Klaksvík International, Jens Ove Fries Nielsen, 45, er ein sera aktivur altjóða meistari. Hóast talvhugurin er stórur, hevur hann mist væl av rating seinastu tvey árini. Hægsta ratingtal Fries Nielsen hevur havt, er 2458. Tað var fyri trimum árum síðani.

Jens Ove er ein fryntligur maður, sum eg nakrar ferðir havi skift orð við í ymiskum talvkappingum á flatlondum. Í novembur í fjør vónaði hann inniliga at fáa møguleikan at verja sigurin frá í fjør.

Tveir fyrrverandi kappingarvinnarar eru sostatt við í fjórðu útgávuni av Klaksvík International. Til ber at fylgja við á www.faroechess.com.

## Luttakararnir í 4th Klaksvík Int.:

| | |
|---|---|
| Johan Eriksson | (2423) |
| Eirik Gullaksen | (2382) |
| Jens Ove Fries Nielsen | (2381) |
| Heini Olsen | (2325) |
| Hans Kristian Simonsen | (2305) |
| Helgi Dam Ziska | (2177) |

# Tey stóru klára seg

**Manchester United mátti klára seg við 10 monnum, tá teir spældu 0-0, men annars vunnu øll tey stóru liðini í Champions League kappingini í kvøld**

CHAMPIONS LEAGUE

*Jákup Mørk*

Wayne Ronney kom aftur í fokus, tá Manchester United spældi á útivølli móti spanska Villarreal. Eftir at danski Kim Milton Nielsn gav bretanum gult kort, klappaði hann móti dómaranum sum takk, og so kom seinna gula kortið upp.

Aðra staðni fekk eisini Patrick Viera reytt kort í sínum fyrsta CL-dysti fyri Juventus, meðan Robin van Pierse somuleiðis varð rikin av vøllinum, tá Arsenal við neyð og deyð fekk trý stig móti FC Thun.

Úrslitini í kvøld vóru hesi:

| | |
|---|---|
| Arsenal-Thun | 2-1 |
| Benfica-Lille | 1-0 |
| Club Brugge-Juventus | 1-2 |
| Rapid Wien-Bayern Munchen | 0-1 |
| Sparta Prague-Ajax | 1-1 |
| Udinese-Panathinaikos | 3-0 |
| Villarreal-Man Utd. | 0-0 |
| Werder Bremen-Barcelona | 0-2 |

# HB verður annar parturin í finaluni

**Eldra havnarfelagið vann tepurt á tí yngra, og nú skal HB spæla móti annaðhvørt NSÍ ella KÍ, sum fara at spæla í kvøld**

UNGLINGAR

*Jóannes H,ansen*

Mikukvøldið vann HB sær pláss í unglingafinaluni. Í tættari og spennandi uppgerð vann HB 2-1 á B36. Í ár er bara talan um eina hálvfinalu. Hvat mótstøðuliðið hjá HB fer at verða í unglingafinaluni fæst at vita í kvøld. Tá skulu NSÍ og KÍ telvast í Runavík. Sambært kappingarskipanini verður finalan á uttanveltaðum vølli mikudagin 28. september, og tá fer eisini á uttanveltaðum vølli at verða spælt um bronsukrónurnar. Í tí uppgerðini fer B36 at spæla móti liðnum, sum fer at liggja undir í Runavík í kvøld.

Mikukvøldið var tað B36, sum hevði bóltin mest, men tað var HB, sum fekk tvey tey fyrstu málini. Í 27. minutti var tað nýggi 1. liðsspælarin Svenn Jacobsen, sum skoraði aftaná hornasparksinnlegg, og í 68. minutti var 1. liðsspælarin hjá B36, Levi Hanssen, so óheppin at gera sjálvmál, eftir at B36 leingi hevði stríðst fyri at javna.

Fýra minuttir undan leikloki eydnaðist tað Levi Hanssen at gera mál í rætta endanum, tá ið hann sendi fríspark í kassan. So spenti B36 uppaftur meiri í fyri at fáa útjavnandi málið og harvið longda leiktíð, men tað eydnaðist ikki.

Í síðstu løtu sá Thomas Hans Rubeksen, sum er partur av besta B36 liðnum, reytt. Tað ber við sær, at hann verður leikbannaður sunnudagin, tá ið B36 fer at fáa vitjan av ÍF.

Páll Augustinussen var dómari í Gundadali, og í kvøld verður tað Petur Reinert, sum fer at halda skil á hálvfinalu uppgerðini millum NSÍ og KÍ.